# UPPGÁVA 2D

## Ungfólk í syndarligari ferðsluvanlukku

Tit skulu gera eina søgu um vanlukkuna

- Byrjið við at lesa greinastubban um vanlukkuna
- Persónarnir í vanlukkuni eru persónarnir, sum tit hava gjørt
- Tit skulu greiða frá, hví kvøldið hjá teimum endaði soleiðis

**Søgan, sum tit gera, skal svara hesum spurningum:**

- Hvør var partur av vanlukkuni?
- Hví koyrdu tey bil?
- Hvør sat hvar í bilinum?
- Vóru tey íbundin trygdarbelti?
- Hvussu kendu tey bilføraran?
- Høvdu tey drukkið?
- Var bilførarin ávirkaður?

Søgan skal passa til teir fýra persónarnar, sum tit hava gjørt.

### Ungfólk í syndarligari ferðsluvanlukku

Ein bilførari doyði seint fríggjakvøldið, tá ið hann misti tamarhaldið á bilinum á landsvegnum.

Hann varð slongdur úr bilinum og rakti ein stein. Tó at kanningarnar av vanlukkuni ikki eru lidnar, er helst sannlíkt, at ferðin hevur verið hægri enn hámarksferðin, sigur vakthavandi á Politistøðini í Havn.

Umframt 18 ára gamla bilføraran vóru trý ungfólk í bilinum, ein 16 ára gamal drongur og tvær 16 ára gamlar gentur. Hesi trý fingu bert smásnuddir, men øll eru flutt á Landssjúkrahúsið til kanningar.

betri
RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD
Tilfar brúkt við loyvi frá: RÅDET FOR SIKKER TRAFIK